SKÚLIN FLØTUM

23. apríl 2026

# Skúlastýrisfundur 06 – í Gulaskúla

| | |
|---|---|
| Møtt á fundi: | Erla, Snorri, Poula, Regin, Sjúrður & Heidi |
| Forfall: | Kári, |
| Gestir: | Jóhan Marni Stenberg, deildarleiðari í Gulaskúla |
| Fundarlongd: | 16-18 |

Skrá:

1. Guliskúli, upptøka, ætlanir, víðkan og tilboðið í síni heild (Jóhan)
2. Gamlibygningurin og garðurin, Ætlanir, renoveringar, verkætalnir og endamál (Heidi)
3. Skúlaaftran. Skal skúlastýrið arbeiða við eini leiðreglu um hvussu SáF takklar børn í mistrivnaði og/ella skúlaaftran. (Poula)
4. Skúlaleikir. Hvussu meldar SáF til og hví eru ikki øll í 7.fl meldað til. (Snorri)
5. Ymiskt
    a. Felags foreldrafundurin
6. Àseta næsta fund

---

## Ad.1 Guliskúli

Guliskúli, upptøka, ætlanir, víðkan og tilboðið í síni heild (Jóhan)
Sí myndir av pptx aftast.

## Ad.2 Gamli bygningurin og garðurin

Gamlibygningurin og garðurin, Ætlanir, renoveringar, verkætalnir og endamál (Heidi)

Tað hevur verið lítið virksemi í Argja skúla í seinastuni, tí skúlin er í so ringum standi. Guli skúli brúkar niðastu hølini í norðurendanum á bygninginum til smíðstovu og súkkluverkstað, og suðurendin á bygninginum verður brúktur til AA-fundir.

Annars er einki virksemi í skúlanum, men tað skal nú broytast. Ætlanin er at heildarumvæla skúlan, so Guli skúli fær nøkur undirvísingarhøli afturat, umframt at frítíðartilboð til 3.-6. flokk eisini skulu vera í skúlanum.

Avtala er gjørd millum Tórshavnar kommunu og sp/f HVT um arbeiðið at umvæla skúlan, og sáttmálin verður undirskrivaður fríggjadagin.

Ætlanin er at fara í gongd við arbeiðið beinanvegin. Tað umfatar í fyrstu atløgu at skifta klædningin, vindeygu og tekjuna.

Ætlanin er, at útiarbeiðið skal vera liðugt í ár.
Síðani skal skúlin gerast klárur innan, og væntandi klárar at taka í nýtslu í august 2027, tá eitt nýtt skúlaár byrjar.



## Ad.3 Skúlaaftran og mannagongdir

Skúlaaftran. Skal skúlastýrið arbeiða við eini leiðreglu um hvussu SáF taklar børn í mistrivnaði og/ella skúlaaftran.  (Poula)

Gjgøgnumgongd av yvirskipaðar ætlan fyri at gera mannagongdir, tí foreldraumboðini ynskja mannagongdir, tá næmingar fara í mistrivnað.

Regin vísir at verandi mannagondir við uppmøting, afturboðan um arbeiðslag, arbeiðið hjá førleikastovuni og skipanum sum AKT og SSP.

Avgjørt verður, at skúlastýrið tekur málið uppaftur í heyst.

## Ad.4 Skúlaleikir

Skúlaleikir. Hvussu meldar SáF til og hví eru ikki øll í 7.fl meldað til. (Snorri)

Tað undrar foreldraumboðini í skúlastýrinum, at bara ein av 4 flokkum eru tilmeldaðir skúlaleikir.

Skúlaleiðslan vísir á at her er samanfall millum fleiri tiltøk og skúlin hevur raðfest.
Allir flokkar hava meldað til AKT/SSP tiltakið "ung og rús", ið er ´í 3 dagar. Tríggir 7.fl hava havt eina kantinuverætlan í 4 vikur. Tríggir flokkar eru meldaðir til stórkapping í talvi og ein flokkur er melaður til skúlaleikir. Talan var um raðfesting. Ikki frával av skúlaleikum, sum skúlin tekur undir við.

Skúlastýrið er nøgt við frágreinðingina.

## Ad.5 Ymiskt

1.
Frá seinastu fundarfrágreiðing:

Uppskot til evni til foreldrafund frá seinasta fundi.

- Ergo- og fysioterapeut til hugsavnan í skúlanum.
- Ergo og innbúgv
- Vandar á netinum
- Hvussu er mann tað góða foreldrið. *Kristian Eli Andersen*

Skúlastýrið ynskir at arbeiða víðari at fáa Kristian Eli at hava ein fyrilestur um hetta og víðka tað eitt sindur. Erla arbeiðir víðari við hesum til næsta fund.

Status er, at vit hava ikki fingið fatur á Kristian Eli.
Erla vendir aftur.

Evt flyta til september.

## Ad.6 Áseta næsta fund

Hósdagin 4. Juni 2026 kl 19

Ískoyti – Framløga um Gulaskúla






## GULISKÚLI BYGGIR Á GRUNDTÆTTIRNAR TOL, TÍÐ OG TRYGGLEIKI

- **Missión**
- *At menna eina betri søgu hjá næminginum*
- *Tol at skapa góðar relatiónir*
- *Tíð at menna førleikar - eisini í felagsskapinum*
- *Tryggleiki at skapa trivnað*

- **Visjón**
- *Trivnaður og læring*

## SKIPANIN Í DAG

- Í Gulaskúla:
- 6 toymir
- 3 toymir í Miðdeild
- 3 toymir í Hádeild

- Skúlin á Fløtum
- 1 toymi í Hádeild - Útslúsingarflokkur



# DAGURIN Í GULASKÚLA

- Næmingarnir møta kl. 8.00 – 13.00
- Lýst í kunngerð um sertilboð.

- Dagurin er býttur í tvey:
- Fyrri partur er vanligu fakini í fólkaskúlanum
- Annar partur eru valfak.

| Kl. | Mánadagur | Týsdagur | Mikudagur | Hósdagur | Fríggjadagur |
|---|---|---|---|---|---|
| 08.00 – 08.45 | Føroyskt | Borðspøl | Føroyskt | Borðspøl | Sosialfak |
| 08.45 – 09.00 | Fríkorter | Fríkorter | Fríkorter | Fríkorter | Fríkorter |
| 09.00 – 09.45 | Støddfrøði | Føroyskt | Kunningarfak | Støddfrøði | Føroyskt |
| 09.45 – 10.00 | Fríkorter | Fríkorter | Fríkorter | Fríkorter | Fríkorter |
| 10.00 – 10.45 | Menningartúrur | Støddfrøði | Útiskúli | Málfak | Svimjing |
| 10.45 – 11.15 | Menningartúrur | Støddfrøði | Útiskúli | Málfak | Svimjing |
| 11.30 – 13.00 | Menningartúrur | Valfak | Útiskúli | Valfak | Valfak/hugni |

# VALFAKINI

- Byggja valfakini á tað, ið næmingar eru áhugaðir í (Lystbetonet)
- Mikudagur er útiskúladagur
- Tey, ið ikki fara útiskúla eru eftir á skúlanum og fáa undirvísing.



## UPPTØKA TIL GULASKÚLA

- Tað er Sernám, sum í samráð við heimaskúlan og foreldur ger umsóknir til sertilboð.
- Upptøkufundur verður hildin í mars/apríl
- https://saf.fo/180

## STARVSFÓLKINI - ARBEIÐSTÍÐ



- Arbeiðstíðin á skúlanum er frá kl. 7.45 – 15.00
- Undirvísing hvønn dag frá 8.00 – 13.00.
- Mánadagar: Toymisfundir
- Týsdagar: Starvsfólkafundur/námsfrøðiligur fundur
- Mikudagar: Foreldrafundir – uttanhýsis
- Hósdagar: Skúlamenning, skeið, fundarvirksemi
- Fríggjadagar: Eftirmeta vikuna, seta mál á skrá til toymisfundir mánadagar


VÍÐKAN AV TILBOÐNUM
Í samstarvi við Eysturskúlan og Skúlan á Fløtum
Leggja Lonirnar í Hoydølum saman við Gulaskúla.
Lonirnar hava næmingar í 1. – 3. flokki.
Orsøkir: Lonirnar skulu niðurtakast – Gera eitt heilt skúlatilboð til næmingar, ið tørva sertilboð.
Skiftisnámsfrøði
Skiftini hava í summum føri ført til, at tað tekur upp til tvey ár at fella til í Gulaskúla
Húsast í Gamla skúla


SKIPAN - BROYTINGAR
Skúlin á Fløtum
Guliskúli
Lopfjølin


SKIPAN - BROYTINGAR
Skúlin á Fløtum
Guliskúli - Lopfjølin


TØRVUR Á AT BROYTA
Frá sertilboð til Viðgerarskúla
Fjølbroyttari starvsfólkasamanseting:
Sosialráðgevi – Sálarfrøðingur - Ergo
Skipa skúlan við egnari leiðslutíð
Toymi til skúlaaftran


MÍN RAÐFESTING TIL KOMANDI SKÚLAÁR
Guliskúli og Lopfjølin er sami stovnur
Nýtt toymi til næmingar sum hava skúlaaftran


ENDA TANKAR AT HUGSA UM
Guliskúli er síðsti møguleiki at bjarga børnum í mistrivnaði. Next stop DK
Sernám kann ikki veita starvsfólkum supervisjón
Sernám hevur ikki sæð ein næming – men skal ráðgeva.
Næmingar, ið tørva viðger fáa næstan onga.
Onki frítíðartilboð - men nógvir tímar til stuðlar.
Guliskúli er stoppklossin, so fjøldin í Steinatúni ikki veksur